

# Hvussu væl kennir tú Bíbliuna?

## Jólakapping fyri børn upp til 17 ár

Nú jólini standa fyri durum, fara vit á Sosialinum undir eina kapping við spurningum til børn og ung upp til 17 ár um mangt og hvat í Gamla og Nýggja Testamenti.

Vit byrja í dag hósdag 4. desember við sjey spurningum. Teir skulu øll tit, ið vilja vera við í kappingini, klippa út, svara, skriva navn, bústað, tel. og aldur á, og goyma. Tað sama skulu tit gera við spurningarnar, vit hava til tykkara í hvørjum Sosiali til og við mikudag 17. desember, tá kappingin endar.

Allir spurningarnir í kappingini eru ikki líka lættir at svara. Tá kunnu tit til dømis fara í bíbliusøgurnar, tit lesa ella hava lisið í skúlanum at finna svarini. Ella hví ikki spyrja tey tilkomnu í húsinum! Í telduni ber eisini til at leita eftir svarum.

Leparnar, tit hava klipt út og goymt *(við spurningum, svarum, navnið, bústaði, tel. og aldri)* skulu tit senda Sosialinum í seinasta lagi leygardagin 20. desember. Í brævbjálvanum til okkara skal sama navn standa á øllum lepum. Uttaná skal standa "Jólakapping 2003", navn á luttakara og bústaður. Tit, ið tá hava sent allar lepar inn og svarað rætt, verða við í lutakasti um fýra virðislønir.

Við vón um undirtøku frá hópin av børnum og ungum um alt Føroya land, ynskja vit øllum ein góðan jólamánað.

VINNINGAR:

**1. Vinningur:**

**Vikuskiftisferð fyri tvey til Íslands**

ATLANTIC AIRWAYS



Blue Lagoon




## Hvussu væl kennir tú bíbliuna?

Spurningar úr Nýggja Testamenti

| Spurningar | Tykkara svar |
|---|---|
| **50** Fyrsta undurverkið hjá Jesusi var at gera vatn til vín. Tað hendi í einum brúdleypi. Hvussu æt bygdin, har brúdleypið stóð? | : |
| **51** Kapernaum æt ein bygd, har Jesus hevði tilhald og ofta prædikaði. Hon liggur við eitt vatn. Hvussu æt vatnið? | : |
| **52** Vit hava bønina "Faðir vár" frá eini gitnari talu, Jesus einaferð helt. Hvussu kallast tann talan? | : |
| **53** Tann maðurin, sum hevði doypt Jesus, fekk ein syndarligan enda. Hvussu æt gentan, sum móðurin lokkaði at biðja pápa sín lata seg fáa høvdið á honum á einum fati? | : |
| **54** Í Jerusalem var ein serligur hylur, har sjúk fólk lógu og bíðaðu eftir at verða fyrst at sleppa niðurí og fáa heilsubót, hvørja ferð ein eingil órógvaði vatnið. Hvussu æt hylurin? | : |
| **55** Ein løgkønur spurdi Jesus, hvør var næsti hansara. Jesus svaraði við einum líknilsi sum ein mann, sum fall í ránsmannahendur. Hvør hjálpti ti manninum? | : |
| **56** Í bygdini Betania búðu tvær systrar og ein beiggi, sum Jesus plagdi at vitja. Hvussu æt tann systirin, sum ilskaðist inn á hina, ið setti seg at lýða á Jesus, meðan hon strevaðist? | : |

Navn á luttakara: Bústaður:

Telefon: Aldur:

At klippa út og goyma, til kappingin endar 20. desember. **Seinasta freist at senda** Sosialin allar útkliptu leparnar við spurningum og svarum, navni á luttakara, bústaði, tel. og aldri, er leygardagin 20. desember. Uttan á brævbjálvanum skal standa Jólakapping 2003, umframt navn á luttakara og bústaður. Minnist til, at allir lepar í brævbjálvanum frá hvørjum einstøkum luttakara, skulu hava sama navn.

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
Tel. 341 800 • Fax 341 801






*Jólagávan og jólaklæðini til hann*

**Kallkyn**

Vágsbotnur • Tel. 31 62 06

Hvat við einum gávukorti?



SALONG BYLGJAN
BILLUGØTA 2 · 160 ARGIR
tel 315494

SIEMENS

Stáltól sniðgivin av F.A. Porsche



BIGA

BIGA, Niels Finsens gøta 38, Tel. 32 06 66, Faks 32 06 67, biga@biga.fo, www.biga.fo





Hestprent gevur pappírinum betri flog

HESTPRENT

JÓLAGÁVAN

*Fáast í ljósabrúnum og myrkabrúnum*



599,-

Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 • TLF. 31 17 05
EURO SKO EURO SKO